FØROYA HANDILSSKÚLI

TEKNISKI SKÚLIN

Team 85 • 316511

Kvøldskeið í

## AUTOCAD

**Undirvíst verður í:** Auto-Cad 2000
Skeiðið er fyri fólk, sum lítlar ella ongar royndir hava at arbeiða við Auto-Cad

**Tíð** 24., 25. og 27. sept. og 1., 2., og 4., okt. 2001

**Skeiðleiðari:** *Suni Dalsgaard, arkitektur*

**Kostnaður:** kr. 3.500,- íroknað frálæru, tilfar og mat

**Stað:** Tekniski Skúli, El-deildin, á 1. hædd, Í Smiðjugerði

**Tilmelding:** **í seinasta lagi 21. sept. 2001**

**Handverkarar kunnu søkja stuðul eftir reglugerð um eftirútbúgving av yrkislærdum.**

**Luttakarar, ið hava goldið í eftirútbúgvingargrunnin "VITAN", kunnu søkja um stuðul haðani.**

Umsóknarbløð til Mentamálstýrið og Vitan fáast á Skeiðsdeplinum

*Skeiðið verður hildið treytað av, nóg nógvir luttakarar tekna seg.*
*Nágreiniligir upplýsingar um skeiðinnihald og til meldingarblað fáast við at venda sær til*

**SKEIÐSDEPILIN Á MARKNAGILI * SDM**
Marknagilsvegur 77 • Postrúm 177 • 110 Tórshavn • Tel 31 88 13 • Fax 31 33 74,
T-postur: fh-sth@post.olivant.fo • Heimasíða http://sth.olivant.fo

## Lærlingur

Stendur áhugi tín til elektronik og teldutøkni, kunnu vit bjóða tær lærupláss sum elektromekanikari.

Vit hava fjølbroyttar uppgávur bæði á sjógvi og landi. Neyvari upplýsingar fáast við at skriva ella ringja til okkum

**Met spf**
J. C. Svabosgøta 8 · 100 Tórshavn
Tlf. 317265 · e-postur: tom@navtech.fo

## Almennir fyrilestrar um autismu

Autistafelag Føroya skipar fyri almennum fyrilestri um autismu.

**Evni:** Hvussu hevur man arbeitt í Danmark fyri at bøta um korini hjá autistiskum menniskjum.

**Fyrilestrarrøðari:** Jørgen Lindgren, sum er formaður í »Landsforeningen for autisme« í Danmark.

**Tíð:** Fríggjad. 21/9 og leygard. 22/9. Báðar dagar kl. 19.00.

**Stað:** Veitsluhøll Landssjúkrahúsins.

**Málbólkur:** Øll við ábyrgd og áhuga fyri autismu.

**Skrá:**
**Fríggjad. 21/9, kl. 19.00:**
1. Um autismu sum heild og menning innan Autismuumráði tey seinastu árini.
2. Hvørjir møguleikar eru í Danmark fyri at fáa fíggjarliga hjálp og pedagogiska vegleiðing? Hvørji tilboð eru fyri smábørn og vaksin við autismu í Danmark?

**Leygard. 22/9, kl. 19.00:**
1. Hvat skulu foreldrini gera, tá tey hava fingið diagnosuna staðfesta?
   Fáa foreldrini serliga hjálp og stuðul ta fyrstu tíðina eftir at diagnosan er sett?
2. Hvørji argument nýtti man í Danmark yvirfyri myndugleikum fyri at fáa til vega serskúlar og bústaðir?
   Hvussu eru møguleikarnir í Danmark fyri at útbúgva yrkisfólk til at undirvísa menniskjum við autismu?
   Hvussu sær framtíðin út hjá menniskjum við autismu í Danmark?

**Autistafelag Føroya**

S&K

## Frá S&K-felagnum

Treytað av nóg góðari undirtøku,
verður skipað fyri skeiðnum

**Roknskaparfatan**

9., 23. og 30. oktober 2001
hvønn dag frá kl. 13.00–17.00.

Skeiðið verður hildið á Føroya Handilsskúla og lærari verður Olav Absalonsen.

**Tilmelding innan 24. september 2001**

**S&K-felagið**
tlf. 316837 · fax. 310451
e-mail: skfelag@post.olivant.fo

## Til allar seyðamenn!

Teir, sum ynskja broytingar í skamtatali til koppingarevni fyri garnasótt, kunnu boða Tjaldurs apotekinum frá á **tlf. 341100**.

**Tjaldurs Apotek**

## Bilur til sølu

Hvítur Toyota Corolla, árg. 89, koyrt 149.500 km, 4 hurðar, til sølu um hóskandi boð fæst.

**Tlf. 216365**

Sosialurin
www.sosialurin.fo

## Stuttskeið 2001 og Háskúlaskeiðið 2002

**Telduskeið**
***Grundskeið í Windows:*** 25-27/sept.
***Arbeið skjótari uttan mús:*** (tekstviðgerð) 2-4/okt
***Grundskeið í Windows:*** 9-11/okt..
Kostnaður (íroknað døgurða) fyri hvørt skeiðið er kr. **1.500,-**
Lærari: Høgni Højgaard
**Avmarkað luttøka**

**Seymiskeið 1.-6. okt.**
Lær at tekna og seyma tíni egnu undirklæði .
Undirvíst verður millum kl 9 og 15.
Kostnaður íroknað vistarhald og tilfar **kr. 1.400,-**
Lærari: Elin Lindenskov
**Avmarkað luttøka**.

**LivaSkriva**
Hóskvøldini frá 20. sept. til 8. nov. kl. 19-22.
**Hin Nýggja Náttúran**
Vit fara ígjøgnum partar av klassiskari og nýggjari náttúrlyrikk og arbeiða við egnum tekstum.
Kostnaður: 1.500,-
(lesandi 950,-)
Skeiðleiðari:
Oddfríður Rasmussen

**Eftirføðingarskeið**
Eftirføðingarfimleikur, undirvísing og vegleiðing.
Lærari:
Sólrun Patursson,
fysioterapeutur.
10 mikudagar frá 13 til 15
Byrjar 21. november
Kostnaður: kr. 500,-

**Háskúlaskeiðið 2002**
byrjar 7. januar og endar síðst í juni 2002.

Set teg í samband við okkum um gjøllari upplýsingar og innskrivingarblað!

**Legg til merkis:**
**Familjuskeiðini og pensiónistaskeiðini eru fullteknaði !**

**Føroya Fólkaháskúli**
**Háskúlavegur 14 - FO 100 Tórshavn**
**Telefon 31 17 43 - Telefax 31 96 87**
**Heimasíða: www.skulin.fo/ffh - Teldupostur: ffh@skulin.fo**

LÍV FØROYA LÍVSTRYGGING

## Lærupláss

Føroya Lívstrygging søkir eftir einum tryggingarlærlingi.

Vit bjóða eina fjølbroytta tryggingarútbúgving, sum í lærutíðini eisini fevnir um luttøku á tryggingarskúla. Lærutíðin er 2 ár og gevur møguleika fyri framhaldandi starvi á tryggingarøkinum aftaná lokna lærutíð.

Umsøkjarin skal hava students-, HF, HH-prógv, ella aðra hægri útbúgving og hava kunnleika til teldu á brúkarastøði.

Umsókn saman við prógvum og møguligum viðmælum skal vera okkum í hendi 25. september. Hevur tú spurningar, fæst meira at vita frá Bartal Kass, starvsfólkaleiðara, á **tlf. 311111** ella telduposti bartal@liv.fo

**P/f Føroya Lívstrygging**
Postboks 206 • Kopargøta 1 • 110 Tórshavn
Tel. 31 11 11 • www.liv.fo

## Rudding

Í sambandi við at Tvøroyrar Kommuna fer at rudda økið í Grótbrotinum undir Akurgerði, verður heitt á øll, sum hava lutir ella amboð liggjandi í Grótbrotinum, um at beina hetta burtur sum skjótast og í seinasta lagi 28. sept. 2001 kl. 12.00. Annars verður tað beint burtur fyri eigarans rokning.

**Tvøroyrar kommuna**

## Cafeteria í ítróttarhøllini á Kambsdali

verður hervið lýst til útleigan.

Áhugað kunnu í seinasta lagi 01.10.2001 venda sær til:

**Hallarnevndin**
v/ Jón N. Olsen
Kambsdalur
530 Fuglafjørður

## Bilur til sølu

Toyota Corolla 1,3, árg. 92, 5 hurðar, 105.000 km, nýlakeraður, til sølu fyri 55.000 kr.

**Tlf. 223699 - 311013**

## Dagrøktin í Vági

Dagrøktarskipanin í Vágs kommunu søkir eftir dagrøktara at byrja skjótast gjørligt.

Vit kunnu bjóða eitt áhugavert starv, har tú kemur at arbeiða saman við øðrum dagrøktarum í dagrøktarhúsinum 2 dagar um vikuna.

Vit ynskja at umsøkjarin hevur umstøður at ansa eftir børnum g kann skapa ein tryggan, fjølbroyttan gerandisdag, við virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Irdi Bjarkhamar, dagrøktarleiðara, á tlf. 373755.

**Dagrøktarskipanin í Vágs kommunu**
Tlf. 373755 · 228442

## Sjónleikarhúsið 1926–2001

Ætlan Havnar Sjónleikarfelags er at gera eina framsýning, ið lýsir virksemi húsins í 75 ár.

Tí heita vit á fólk, ið eiga myndir, skrivlig tilfar ella hava onkra søgu um húsið og virksemi tess, um at seta seg í samband við skrivstovu felagsins.

Skrivstovan er opin mánadag–hósdag kl. 8–16.00.

**Tlf. 311132 · Fax 315666**

## Kunngerð

LFÚ

Skrivstovan hevur fingið nýggjar upplatingartíðir: **Týsdag og hósdag frá kl. 11.00–16.00.**

**LFÚ**

## Aðalfundur

LFÚ

Aðalfundurin, sum skuldi verða 10. oktober, verður ístaðin leygardagin 20. oktober.

**LFÚ**

## Dagrøktari

Søkt verður eftir dagrøktara sum avloysara at byrja skjótast tilber.

**Dagrøktin í Sandavági**
Tlf. 333930 & 332470

FØROYA HANDILSSKÚLI

TEKNISKI SKÚLIN

Team 85 • 316511

## SOSIALPSYKIATRI I

**Endamál**
At skeiðluttakarin fær eina grundleggjandi vitan um, og innlit í tað sosialfrøðisliga umráðið. Eisini skal luttakarin megna at skilja ímillum tørvin hjá sjúklinginum og egnan tørv og mørk.

At skeiðluttakarin nemur sær eina grundleggjandi vitan um tey mest vanligu sálarligu brekini og viðgerðina av hesum.

**Skeiðið er ætlað**
Eftirlitahavandi fólki innan sosiala og heilsuøkið, heimahjálparar, sosial- og heilsurøktarar, sjúkrahjálparar. Somuleiðis verkstaðarassitentar, ið arbeiða innan hettar øki.

**Tíð:** frá 5.-16. nov. 2001

**Skeiðleiðari:** *Lærari frá Skolen i Hammer Bakker í Vodskov*

**Kostnaður:** kr. 5.500,- íroknað frálæru, tilfar og mat

**Tilmelding:** **áðrenn 5. oktober 2001**

Fráboðan um luttøku og nærri frágreiðing (eisini um innivist v.m.), fæst við at venda sær til skúlan á tel 318813

*Skeiðið verður hildið treytað av, nóg nógvir luttakarar tekna seg.*
*Nágreiniligir upplýsingar um skeiðinnihald og til meldingarblað fáast við at venda sær til*

**SKEIÐSDEPILIN Á MARKNAGILI * SDM**
Marknagilsvegur 77 • Postrúm 177 • 110 Tórshavn • Tel 31 88 13 • Fax 31 33 74,
T-postur: fh-sth@post.olivant.fo • Heimasíða http://sth.olivant.fo

## Stuðulsfólk

Søkt verður eftir stuðulsfólki til 4 ára gamla rørslubrekaða gentu í Tórshavn.

Arbeiðið hjá stuðlinum verður í heiminum hjá barninum, í neyvum samstarvi við familjuna og aðrar stuðlar.

Arbeiðstíðin er 25 tímar um vikuna og er skiftandi seinnapartar, nátt og eitt samdøgur annan hvønn mánaða.

Setunartíðin er 01.10.01.

Lønar- og setunarviðurskiftini eru sambært sáttmála ímillum Fíggjarmálastýrið og Føroya Pedagogfelag.

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja til Ragnhild Dahl á tlf. 314822.

Umsóknir mugu vera okkum í hendi skjótast gjørligt og skulu sendast til:

**Almannastovuna**
Box 3096
att. Ragnhild Dahl
110 Tórshavn